# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Mær dámar væl í London og í Chelsea, men mítt spæl tykist ikki at rigga her*

*Andrey Shevchenko, Chelsea*

VB-Neistin:

## Bæði eru í toppformi

**Tað eru tey bæði í løtuni sterkastu liðini, sum fara á vøllin, tá VB tekur móti Neistanum sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Fyrra dystin millum liðini vann Neistin trygt, men síðani tykist VB veruliga hava ment seg*

Við hvør sínum sigri á Stjørnuni eru bæði VB og Neistin í toppformi. Sunnudagin skulu tey stríðast um tað, sum alt meira líkist oddasessinum í grundspælinum, og tó at hesin í sjálvum sær ikki gevur tað heilt stóra, so leggja liðini stóran dent á at vinna.

– Sum skipanin er, so kann ein sigur í grundspælinum ikki brúkast til tað stóra. Men fyri moralin og sjálvsálitið hevur hetta sera stóran týdning fyri okkum, sigur Egil Steintórsson, sum í vetur venur VB-kvinnurnar.

Hóast nakað av útskifting hevur verið í hópinum, so hava úrslitini hjá VB higar til verið góð, og Egil heldur, at hetta kunnu tey avgjørt byggja víðari á.

– Vit taptu móti Neistanum og StÍF tíðliga í vetur, men síðani hevur gingið støðugt framá. Eg veit væl, at liðið er viðbrekið fyri skaðum, men soleiðis vil tað altíð vera, sigur Egil.

Sunnudagin er VB-liðið tó ikki skert. Egil sigur, at hóast onkrir smærri snuddir eru, so eru allar á liðnum tøkar.

Og eisini hjá Neistanum er sjálvsálitið í toppi. Ikki minst tykist sigurin á Stjørnuni týskvøldið at hava lyft liðið, og tær siga seg vera til reiðar at fara eftir øllum, nú tær skulu til Vág.

Einasta ivamálið í hópinum er Nicoleta Radu Hansen. Hon hevur havt ein lítlan knæskaða at dragast við, men tá vit frættu úr Neistanum hóskvøldið, varð tó roknað við, at hon verður á liðnum sunnudagin.

Kyndil-StÍF:

## Dysturin um seinasta plássið

Tað tykist eingin ivi vera um, at tað verða Stjørnan, Neistin og VB, sum fara við teimum trimum ovastu plássunum í grundspælinum í Sunset-kappingini. Hinvegin er spurningurin um fjórða sessin í endaspælinum púrasta opin. StÍF hevur her fyrimunin, tí tær í Vági vunnu ein sera óvæntaðan sigur. Kyndil megnaði hin vegin ein óvæntaðan javnleik móti Neistanum, og so hava liðini bæði ein javnleik í fyrra innan hýsis dystinum.

Tí stendur og fellur spurningurin um eitt endaspæl í ovaru ella niðaru hálvu við dystinum í Havn sunnudagin.

---

KÍF-VÍF:

## Vestmenningar í Kollafirði

Fyri fyrstu ferð eiga kollfirðingar veruligan heimavøll, tá teir taka móti VÍF. Ein uppgerð, sum tey nógvu seinnu árini hevur verið spæld í Vestmanna. Hvørt fyrimunurin av heimavølli so er nóg mikið at nerta góðu hagtølini, sum vestmenningar hava móti KÍF, er ein annar spurningur.

Seinastu umførini hava liðini í øllum førum togað hvør sín veg. VÍF sum kanska mest upplagdi FM-favoritturin í løtuni, meðan KÍF púrasta tykist hava mist ondina.

Stríðsviljanum plagar hinvegin ikki at bila nakað, tá KÍF spælir móti grannunum fyri norðan, og tí kann talan væl gerast um eina sera lívliga uppgerð.

Kyndil-StÍF:

## Teir grønu vilja ígongd

**Sigurin á H71 var kanska startskotið hjá Kyndli, sum nú er farið at líkjast sær sjálvum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað hevur verið eitt soltið heyst hjá meistarunum úr Kyndli. Meistaraspælið hevur fyri tað mesta verið langt burturi, og eitt skifti var liðið púra einsamalt í botninum av stigatalvuni.

Seinastu umførini er tó vend komin í. Móti hinum báðum liðunum í niðaru hálvu – H71 og KÍF – hevur talan verið um tryggar sigrar, og tað ber kanska boð um, at verulig ferð nú er komið á liðið.

Ikki minst man tað hita fleiri av grønu hjørtunum, at Høgni Klein nú er komin aftur til landið, og kemur hann fyri seg, er einki at ivast í, at Kyndil verður stórur biti – eisini hjá teimum, sum í løtuni standa seg best á stigatalvuni.

Fyrsta ábendingin um hetta kann koma sunnudagin, tá Kyndil tekur móti StÍF. StÍF hevur higar til staðið seg sera væl, men skulu teir framvegis halda seg í oddinum, tá endaspælið fer ígongd, er neyðugt við sigri á Kyndli. Strandingar hava tó verið darvaðir av, at ov nógvar byrður hava ligið á Finni Hansson – ikki minst, tá skaðar hava rakt stóran part av bak-ketuni annars.

Hjá Kyndli hevur saknurin í Høgna verið stórur, men í aðrar mátar tykist liðið væl mannað. Og so er spurningurin, hvørt heildin fæst at rigga, áðrenn týðandi dystirnir í endaspælinum verða blástir ígongd.